# Útoyggjafelag ger um seg

**Í farnu vikuni vóru Olga Biskopstø og Óla Jákup úr Dímun frá Útoyggjafelagnum ein túr í Kalsoynni. Endamálið við túrinum var at kunna um felagið, og eisini at fáa felagnum fleiri limir.**

ÚTOYGGJA-VERKÆTLAN
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Útoyggjar:** Seinastu tíðina hevur Útoyggjafelagið ferðast runt til fleiri útoyggjar í Føroyum, har tey hava hildið kunnandi fundir um felagið. Harumframt fáa fólk á fundunum eisini møguleika at tekna seg sum lim hjá felagnum.

### Vitjaðu Kalssoynna

Í farnu vikuni fóru tvey umboð fyri felagið so aftur ein túr. Hesuferð vóru tað Olga Bisopstø og Òla Jákup úr Dímun, og skuldu tey til Kalsoynna at kunna um Útoyggjafelgið.

Fyrst vitjaðu tey bæði á Húsum. Her varð fundur hildin í skúlanum á staðnum, og varð fundurin væl vitjaður. Bæði fólk frá



*Óla Jákup og konfirmantar umborð á Barsskor*

Húsum og Syðradali møttu upp, og teknaðu fleiri seg sum lim hjá Útoyggjafelagnum.

Síðani var farið norður til Mikladals. Her varð fundurin hildin í fráhaldshúsinum "Innistova", og møtti nærum alt fólkið á Mikldali til fundin, umframt at nógv fólk av Trøllanesi eisini vóru til staðar. Hesin fundurin gekk væl, og felagið fekk enn fleiri limir.

### Keðiligt veður

Dagurin var annars merktur av tí vánaliga veðrinum. Tað var kavarok og stormur, og ferðin við bussi norður eftir oynni var rættiliga buldraslig, tá nógv jarðrok var.

Heimferðin var ikki minni roykmikil, og ivasamt var, um Barsskor kundi leggja at á Syðradali. Konfirmantar úr Klaksvík, sum saman við Hans Eiler Hammer, presti, høvdu verið á Húsum til konfirmantlestur, fingu av álvara roynt, hvussu tað er at ferðast um Kalsoyarfjørð á vetrardegi í Barsskor.

Men alt gekk gott, og ferðafólkið kom til Klaksvíkar í øllum góðum.

### Formaður veðurfastur

Formaðurin í Útoyggjafelagnum, Óla Jákup úr Dímun, fór beina leið umborð á Dúgvuna, tá hann skuldi víðari til Havnar.

Men komin til Leirvíkar vísti tað seg, at bussarnir ikki koyrdu. Hann fór tí við einum av privatbilunum, sum vóru við Dúgvuni – men komnir til Runavíkar bar ikki til meira. Kavin var nú so nógvur, og ikki var framkomandi nakrastaðni.

Tískil lá formaðurin eftir túrin á Kalsoynni veðurfastur í Runavík.

### Út í Heyst

Í komandi viku er ætlanin, at Útoyggjafelgið skal ein túr út í Heyst, og fáa heystmenn her møguleika at frætta meir um framtíðarætlanir og annað hjá Útoyggjafegnum.

# Trongligt á keiøkinum

**Økið á Vestaru kei í Klaksvík gerst bara alsamt meiri og meiri trongligt. Heini í Marknagili, avgreiðslumaður á Skipafelagnum Føroyar í Klaksvík fílist á arbeiðsumstøðurnar**

*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** - Verður hetta ferðin á samfelagnum, so má eitt ella annað gerast, sigur Heini í Marknagili.

- Her er alt ov trongligt á keiøkinum, og harafturat er so nógv ferðsla her eisini. Tað er sera vandamikið, tí at førarin á tí stóra trukkinum merkir ikki, um hann tekur í ein persónbil. Tað kann standast størsti skaði av hesum, heldur Heini fram.

- Tann nýggi trukkurin setur sera stór krøv til keiøkið, við tað at vektin er so øgilig. Trukkurin og ein av teimum stóru bingjunum viga um hundrað tons, sigur Heini.

Skipafelagið hevur eitt øki á keiini til at seta bingjur. Heini dylur ikki yvir, at nú tað nýggja kryvjivirkið eisini er har, versna umstøðurnar uppaftur meira.

Arbeitt verður í løtuni við at gera eina góðshavn norði í Ánunum, men Heini sigur, at tað letur til at har er langt eftir á mál.

Skipafelagið fekk tann stóra trukkin í fjør summar. Hann er ein stórur fyrimunur. Arbeiðið gongur dupult so skjótt nú. Áðrenn høvdu teir ein síðulyftara, sum bæði tók nógv pláss, og tað tók longri tíð at arbeiða við honum.

- Ynskið hjá okkum er, at fáa víðari ræsur, sigur Heini í Marknagili at enda.

### Verður ikki gjørt meir

- Tað gerst ikki meir við keiøkið á Vestaru bryggju, sigur Torleif Sigurðsson, formaður í Havnanevndini í Klaksvíkar Býráð. – Har er sera trongligt, men tað ber ikki til at blíva við at byggja út. Heldur haldi eg, at Skipafelagið skal til rættisleggja teirra arbeiði betur, heldur Torleif fram.

- Tað nyttar onki at nýta keiøkið, sum eitt bingjudepot.

Torleif vísir annars á, at teir arbeiða av øllum alvi við at finna tað fíggjarliga grundarlagið til at gera Góðshavnina norðuri í Ánunum lidna.

- Tað fer væntandi at kosta umleið 20 milliónir afturat tí, sum er gjørt.

- Eg harmist um, at Góðshavnin nústani kemur. Um tað hevði verið klárt fyrr, ivist eg ikki í, at til dømis tað nýggja kryvjivirkið hevði staðið har og ikki inni í Klaksvík, sigur Torleif Sigurðsson.

- Tað er trongt í Klaksvík og tí haldi eg, at tað er gott, at tað verður gjørt ein Góðshavn uttanfyri, tað er ikki rætt at blíva við at byggja út inni í Klaksvík. Ein annar stórur fyrimunur



*Heini í Marknagili á Skipafelagnum í Klaksvík*

við góðshavnini er, at øll tey stóru skipini, sum koma til Føroyar kunnu leggja at har. Har verður eitt dýpi upp á tólv metrar fram við kei-kantinum, sigur Torleif, sum at enda leggur dent á, at samstarvið millum Klaksvíkar Havn og Skipafelagið er avbera gott.



# Umrøða stóran felagsskúla

**Fleiri kommunur í Eysturoynni hava umrøtt møguleikan fyri einum stórum felagsskúla í oynni. Ætlanin er, um hon verður veruleiki, at framhaldsdeildirnar skulu savnast í ein skúla**

SKÚLABYGGING
*Edvard Joensen*

**Runavík:** Hugskotið um at byggja ein stóran felasskúla til framhaldsdeildirnar í Eysturoy verður viðgjørdur í hesum døgum.

Á fundi í Runavík seinasta mánadag var málið umrøtt, sigur Hans Petur Ellingsgard, sum er formaður í mentanarnevndini hjá Runavíkar Kommunu.

Hann sigur, at hesin fundurin var annar í røðini, og áhugin tykist vera so mikið stórur fyri uppskotinum, at ein nýggjur fundur er avtalaður at verða aftur um hálvan mars. Á tí fundinum væntar Hans Petur Ellingsgaard, at ein arbeiðsbólkur við limum úr øllum kommunum, sum eru við í ætlanini, verður



*Tað er alt ov kostnaðarmikið hjá Runavíkar Kommunu at fara undir nýbygging av framhaldsskúla. Men verður eitt skúlasamstarv, sum tað, ið nú verður viðgjørt, verður tað mett at bera til, sigur Hans Petur Ellingsgaard, formaður í mentanarnevndini hjá Runavíkar Kommunu*

settur at arbeiða víðari við málinum. Ætlanin er so at seta ein skúlaráðgeva at hjálpa til við verkætlanini.

Kommunurnar, sum eru við í ætlanini, eru umframt Runavíkar og Skála Kommunur eisini Sjóvar Kommuna, Gøtu Kommuna, Oyndarfjarðar Kommuna og Elduvíkar Kommuna. Nes Kommuna hevur boðað frá, at hon verður ikki við í eini møguligari felagsbygging.

Hans Petur Ellingsgaard sigur, at orsøkin til, at hetta er komið í, er tann, at flestu kommunurnar meira ella minni eru komnar á trongd við skúlunum, nú nýggja skúlalóg varð sett í gildi.

Fyri Runavíkar Kommunu hevði tað merkt eina íløgu upp á einar hundrað milliónir krónur ella so, um ein heilt nýggjur skúli skuldi verði bygdur, sigur hann.

Talan hevur verið um at umbyggja og byggja út skúlan á Glyvrum, men tann ætlanin er slept. Í staðin verður tosað um nýbygging. Men tað verður so kostnaðarmikið, at tað verður helst ikki hugsandi um. Hvørki hjá Runavíkar Kommunu einsamallari, tíansheldur hjá teimum smærru kommunum.

Hans Petur Ellingsgaard heldur, at tað hevði verið áhugavert at fingið at vita, hvat aðrar kommunur í Eysturoy meta um ætlanina og møguleikan at vera við í henni.

Hann vísir á, at tað eru frammanundan aðrir felagsskúlar í oynni, og at teir hava virkað væl. Eitt nú Felagsskúlin á Oyrarbakka og skúlarnir á Kambsdali, hagar fólk dagliga koyra til úr ymsum pørtum av Eysturoy og eisini úr Norðoyggjum.

# NCC riggar av



*Tann stóri borivognurin hjá NCC er á veg til Kollafjarðar, haðani hann verður sendur av landinum við skipi*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Boriútgerðin, sum NCC hevur brúkt í Vágatunlinum, er farin av landinum aftur, og samstundis er manningin eisini farin til Noregs at arbeiða**

TUNNILSGERÐ
*Edvard Joensen*

**Leynar:** NCC er farið at rigga av í Leynum. Boriútgerð og manning eru farin aftur til Noregs, har felagið hevur líknandi arbeiði at gera.

Hermann Lindberg, leiðari hjá NCC í Føroyum, sigur, at teir nú eru endaliga lidnir við alt boriarbeiðið, og einki annað er í útliti, sum er. Samstundis hevur felagið onnur arbeiði í Noreg, har brúk er fyri maskinunum. Tær vórðu tí sendar til Noregs. Tær seinastu fóru av Kollafirði nú í vikuni.

Men enn er okkurt eftir hjá NCC at gera í Vágatunlinum. Eitt nú trygging, vegbreyt og rennur.

Hetta arbeiðið gera føroyingarnir, sum hava arbeitt hjá NCC. Fýra norðmenn eru kortini eftir í Føroyum, sigur Hermann Lindberg. Restin av arbeiðsfólkinum hjá NCC í Leynum, umleið 20 mans, eru føroyingar.

NCC skal tetta tunnilin, har vatnlekar eru. Eisini kal felagið taka alla vegbreytina upp og leggja nýggja. Fram við vegginum skulu rennur leggjast, og stoypiarbeiði skal gerast.

Tað fer at taka summarið ella so at gera hetta, sum NCC hevur eftir at gera í Vágatunlinum, væntar Hermann Lindberg.

# Norðoya Sparikassi tók um endan

**Tá Mentanarhúsið í Fuglafirði skuldi gerast liðugt, manglaðu tvær milliónir í, sum stóru peningastovnarnir ikki vildu fíggja. Norðoya Sparikassi tók um endan, og húsið verður væntandi liðugt í summar**

MENTANARHÚS
*Edvard Joensen*

**Fuglafirði:** Norðoyar Sparikassi trúði meira upp á framtíðina hjá Mentanarhúsinum í Fuglafirði, enn teir stóru peningastovnarnir gjørdu. Lítli sparikassin lat húsinum tað lánið, sum teir stóru ikki tordu at geva.

Grundgevingin hjá Norðoya Sparikassa fyri at lata fuglfirðingum lán var tann, sigur Eyðun Hansen, formaður i Fuglafjarðar Sjónleikarafelag, at leiðslan í Norðoyar Sparikassa dugir at síggja, at um stutta tíð er undirsjóvatunnil undir



*Fyri at gera Mentanarhúsið í Fuglafirði liðugt, tók Norðyar Sparikassi um endan, tá teir stóru peningastovnarnir ikki tordu at geva lán*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Leirvíksfirði veruleiki, og tá fara norðoyingar eisini at kunna brúka húsið í Fuglafirði í nógv størri mun enn nú.

– Soleiðis vísir leiðslan i Norðoya Sparikassa bæði framskygni og økismenning í verki, sigur formaðurin í Fuglafjarðar Sjónleikarafelag, sum eigur Fuglafjarðar Mentanarhús.

Grundgevingin hjá hinum peningastovnunum til ikki at geva lán var, at teir fyrr høvdu mist so nógvan pening upp á slík hús, at teir ikki rættiliga trúðu uppá, at hetta kundi bera til, sigur Eyðun Hansen.

### Byrja í smáum

Eyðun Hansen sigur, at tey nú fara at gera Mentanarhúsið liðugt. Nøkur tiltøk verða kortini í húsinum í vár, hóast tað ikki verður tikið alment í nýtslu fyrr enn í summar.

Húsið er í tveimum hæddum, og tann niðara verður endaliga liðug í hesum mánaðinum. Ætlanin er so at hava tríggjar konertir trý fylgjandi leygarkvøld í mars og apríl. Tann fyrsta verður 30. mars og hinar báðar 6. apríl og 13. apríl. Eisini onnur tiltøk verða væntandi í vár.

Lagt er upp til, at húsið skal vera endaliga liðugt og takast alment í nýtslu í juni, sigur Eyðun Hansen.

Seinni í summar verður so Listastevnan, og tá fara eisini ymisk tiltøk at verða í Mentanarhúsinum, sigur formaðurin í Sjónleikarafelagnum.

Mentanarhúsið er longu gitið fyri góðu ljóðviðurskiftini, og tí fara tey eisini at gera nakað burturúr.

Millum annað er fullfíggjað ljóðannlegg keypt, eins og eitt rættiligt Steinway konsertflygel eisini er á veg.

Mett varð rætt at keypa útgerðina heldur enn at leiga hana, hvørja ferð okkurt tiltak skuldi vera.

– Og eg eri sera fegin um ta stóru vælvild, Fuglafjarðar Komuna alla tíðina hevur víst húsinum, sigur Eyðun Hansen.

### Lítil skuld

Samlaða skuldin í Fuglafjarðar Mentanarhúsið verður hesar báðar milliónirnar, nú eru læntar frá Norðoya Sparikassa, sigur Eyðun Hansen.

Hann sigur, at tað, sum goldið er fyri húsið, liggur um einar sjey-átta miliónir krónur.

– Men húsið er vert einar 15 milliónir, sigur hann. Alt tað nógva sjálvbodnað arbeiðið, lagt er í húsið, kann ikki metast nóg høgt, heldur hann. Nakað av almennum stuðuli hevur húsið eisini rætt til, vísir hann á.

Køkur verður gjørdur í húsinum, og í tí sambandi verður kravt, at starvsfólkarúm eisini skulu gerast.

Tað er grundin til, at ovara hæddin nú eisini skal innrættast, sigur Eyðun Hansen. Ætlanin var annars at bíða við henni, og soleiðis sleppa undan lántøku.

Fuglafjarðar Mentanarhús hevur møguleika fyri at reka matstovu, og tey fara eisini at royna at fáa ein kokk, sum kann standa fyri tí partinum.

Eisini skal ein dagligur leiðari setast, sum so skal syrgja fyri at reka húsið, sigur formaðurin í Sjónleikarafelagnum.